## Del Piero hevur longt við Juventus

Alessandro Del Piero hevur spælt yvir 500 dystir fyri Juventus, ið hann kom til í 1993. Tann trúgvi italiumaðurin valdi sjálvt at fara við liðnum niður í Seriu B, tá calciopoli-gølan mundi forkomið italska stórfelagnum. Og nú hevur yndisleikarin í felagnum longt sín sáttmála við tveymum árum. Tað hoyrdist annars søgur, um at Del Piero var ávegis til annað felag, tá hann var ónøgdur við sáttmálaútspælinum frá Juve, men allar gitingar blivu skúgvaðar til viks, tá hann týsdagin undirskrivaði ein sáttmála, ið er fram til 2009.



## 34-ára gamal amerikumaður til TEAM CSC

Team CSC hevur heintað enn ein súkklara frá felagnum Team Discovery, ið ikki vera við í Pro Tour eftir inniverandi kapping. Tann 34-ára gamli amerikumaðurin Jason McCartney hevur underskrivað ein tvey-ára sáttmála við danska súkkluliðið, og fylgir hann tí í fótasporum hjá belgiska Jürgen van Goolen. McCartney hevur umboðað Discovery tey seinastu trý kappingarárini, og hann hevur millum annað ein etapusigur í Vuelta á Espana á visitkortinum. Bjarne Riis væntar sær nógv av tí rutineraða súkklaranum.

## Prísurin á Owen farin upp

**Áhugaði feløg kundu í summar keypa Michael Owen fyri ein bíligan penga, men nú er prísurin á enska landsliðsáleyparanum farin nógv upp**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyri tveimum árum síðani keypti noðrurenska fótbóltsfelagið, Newcastle United, enska landsliðsáleyparan Michael Owen frá Real Madrid fyri 185 mió. kr., men enski áleyparin fekk skrivað inn í sín sáttmála, at hann kundi fara frá felagnum fyri bert 66 mió. kr., um nakað áhugavert tilboð kom á borðið í summar ella síðsta summar.

- Har var ein avtala í sáttmálanum hjá Owen, sum gjørdi, at hann kundi skifta frá okkum fyri ein ávísan prís. Hetta var tó bert í fjør og í ár, so tann avtalan er ikki til longur, sigur formaðurin í Newcastle, Chris Mort.

Michael Owen hevur enn tvey ár eftir av sínum sáttmála við Newcastle United, men hvørki venjarin ella felagið vilja leingja um sáttmálan, fyrrenn Owen hevur víst, at hann kann halda seg burtur frá skaðum í eitt longri tíðarskeið.

Felagið hevur tó nú vissa sær, at Owen ikki fer avstað frá felagnum fyri ein bíligan penga, tí nú kann felagið krevja tann prísin fyri Owen, sum tað metir hann vera verdan.

# U-21 aftur í eldin

**Føroyska U-21 landsliðið skal aftur í eldin seinnapartin í dag, tá teir spæla ímóti Kroatia á Tórsvølli. Seinast føroyska liðið spældi ímóti Kroatia, bleiv tað til eitt 2-0 tap í Varazdin**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tað, sum føroyska A-landsliðið ikki hevur megnað at gjørt tey seinastu seks árini, megnaði føroyska U-21 landsliðið at gera eftir minni enn einum ári í altjóða fótbólti. Leygardagin vunnu teir nevniliga 1-0 á Toftum ímóti Aserbadjan við máli frá Magnus Olsen, og hetta er nakað, sum føroyska A-landsliðið ikki hevur roynt síðani 2001.

Síðani U-21 landsliðið fór upp í altjóða fótbólt fyrr í ár, hevur liðið spælt fýra landsdystir, og úrslitini hjá føroyska liðnum hava verið avbera góð. Leygardagin fekk føroyska U-21 landsliðið eisini løn fyri góðu dystirnar fyrr í ár, tá teir vunnu 1-0 ímóti Aserbadjan, so nú er tað U-21 landsliðið – og ikki A-landsliðið – sum setur Føroyar á fótbóltsheimskortið.



*Magnus Olsen skoraði málið hjá føroyska U-21 landsliðnum í 1-0 sigrinum á Aserbadjan leygardagin*

### Spældu væl seinast

Sjálvt um bæði spælarar, venjarar og føroyingar sum heild fegnast um sera flotta úrslitið hjá U-21 landsliðnum leygardagin, so er greitt, at spælarar og venjarar mugu fáa armarnar niður eftir sigurin, tí seinni í dag er aftur ein landsdystur á skránni. Nú er tað ein av stóru fótbóltstjóðunum, sum kemur á vitjan, tí dysturin seinnapartin verður ímóti Kroatia.

Føroyar hava spælt einaferð fyrr ímóti Kroatia í hesi undankappingini, og tá spældi føroyska liðið ein avbera góðan dyst í Varazdin. Hetta var fyrsti dysturin hjá føroyska U-21 landsliðnum í altjóða høpi nakrantíð, og stóran part av dystinum var føroyska liðið væl við.

Tað var tó Kroatia, sum legði heldur betri fyri. Teir royndu at trýsta Føroyar, og sjálvt um Føroyar var hampiliga væl við, so var tað Kroatia, sum tók leiðsluna mitt í fyrra hálvleiki, tá Ante Rukavina bleiv spældur leysur við Gunnar í málinum.

Eftir hetta var tað sum Kroatia steðgaði eitt sindur upp, og restina av dystinum var Føroyar var Føroyar væl við. Okkara menn fingu eisini ávísar kjansir, men í mál fór bólturin ongantíð. Í staðin slapp Kroatia at økja um leiðsluna tveir minuttir inni í yvirtíðini, og so mátti Føroyar taka til takkar við einum 2-0 tapi.

Nú stendur Kroatia so aftur fyri skotum – ella rættari føroyingum. Hvussu fer at gangast hesa ferð er sjálvandi ilt at spáa um, men um føroyska liðið vísir sama spælið og viljan, sum í undanfarnu dystunum, so er als ikki óhugsandi, at teir kunnu fáa enn eitt gott úrslit.

### Nýtt lið

Um vit samanbaera við síðsta U-21 landsdystin móti Kroatia, so er tað mest sum eitt nýtt føroyskt lið, sum fer á vøllin. Av spælarum, sum byrjaðu inni seinast ímóti Kroatia, vera hvørki Jónas Tór Næs, Jóhan T. Davidsen, Einar Hansen, Pætur Jørgensen ella Bogi Løkin við á føroyska liðnum. Harafturat vera Christian R. Mouritsen og Páll M. Joensen ikki við, og tí er tað mest sum eitt nýtt føroyskt lið, sum fer á vøllin móti Kroatia hesa ferð.

Men menninir, sum eru komnir inn á liðið í staðin fyri hesar, vístu sera gott spæl og dirvi í landsdystinum leygardagin, og tað er eingin ivi um, at teir hava fingið blóð á tonna og fara út á vøllin at stríðast um hvønn bólt.

Dysturin millum Føroyar og Kroatia verður á Tórsvølli í dag kl. 15.00.